**MOTORUR TIL SØLU**
SAAB Diesel, MA 295 HVP 70 EA, 65 HK 3000 við umstýring. Prísur kr. 25.000.
*Tlf. 215283*

**YNSKIST TIL KEYPS**
Kaldbaks- ella føroyskt 8 -10 mannafar við fiskiloyvi, við ringum ella ongum motori, men annars í góðum standi, ynskist til keyps.
*Tlf. 591196*

**TIL SØLU**
Nýggjur 30 HK Yamaha páhangsmotorur og 4.6 m langur gummibátur til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 250856*

**BÁTUR TIL SØLU**
7-mannafar við einum 10 HK Saab motori, el-pumpa til sølu fyri 8.000 kr.
*Tlf. 218874 ella 218873*

**GUMMIBJARGINGARBÁTAR**
Viking, 25 pers. til sølu.
*Tlf. 214604*

## Bingo

**PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN**
hevur BINGO í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 16. mars kl. 18.00. Limirnir kunnu taka gest við.
*Nevndin*

**TVØROYRAR KLUBBI**
Gott bingo verður í Tvøroyrar klubba tórsdagin 17. mars kl. 19.00. Minna eykaspælið endar. Lutaseðlar og 5 kr. spæl.
*Nevndin*

**GOTT BINGO**
verður í Stranda skúla leygardagin 12.m ars kl. 16.00. Nógvir góðir vinningar.
*9A í Stranda skúla*

**RIMMAR PÁSKABINGO**
AB-stuðlar skipa fyri rimmar páskabingo í Pálsstovu 19. mars klokkan 15. Nógvir góðir vinningar. Full pláta gávukort á 500 krónur, tó 6. og 12. spæl full pláta gávukort á 1000 krónur. Á lutaseðli millum annað stór páskaregg, sodavatnskassar, 500 og 1000 krónur gávukort, balja full av mati, hjólbøra full av mati og Apex-ferðaseðil. Eykaspæl. Koyring heim aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*AB-stuðlar*

**PÁSKABINGO**
Verður í stórhúshøll leygardagin 12. mars.
*ÍF*

**GOTT PÁSKABINGO**
Verður í kappróðrarneystinum í Streymnesi mánakvøldið 14. mars kl. 19.00. Nógvir góðir páskavinningar. Eisini verður bingola spælt.
*H.S.R.*

**PÁSKA BARNABINGO**
Verður í kappróðrarneystinum í Streymnesi leygardagin 12. mars klokkan 15.00. Nógv páskaregg verða at vinna.
*H.S.R.*

**BINGO**
verður í Mettustovu mánakvøldið 14. mars kl. 19.00.
*Kvinnufelagið*

**GOTT BINGO**
Frá spastikarafelaganum, gott bingo verður í Pállstovu mánakvøldi 14/3-05 kl 19.00, full pláta 400kr á lutaseðli m.a.2 gávukort á 500kr og tvey á 1000 kr, drigi verður millum spølini, eyka spæl, koyring heim.øll er hjartaliga vælkomin.
*Spastikarafelagið*

**STÓRT PÁSKABINGO Í SANDVÍK**
Skírisdag klokkan 16 verður stórt páskabingo í Ranhøll í Sandvík. Nógvir góðir vinningar. Ókeypis drekkamunnur í steðginum.
*Bygdarfelagið á Rananum*

**LOPPUMARKNAÐUR OG TOMBOLA**
Leygardagin 12. mars 2005 kl. 11.00 verður loppumarknaður og tombola í fimleikarahøllini í Sankta Frans Skúla. Kaffi og køkur verða til keyps.
*Flogbóltsfelagið Fleyr*

**2000 PÁSKAREGG**
Páskareggjatombola er á Shellstøðini í Klaksvík hvønn leygardag fram til páska, frá kl. 10.-13 og 19-22. Eisini er 50-ari, har man kann vinna stórt føroysk páskaregg.
*Bygdarelagið Báran í Árnafirði*

**BINGO**
verður í Felagslonini í Fuglafirði hósdagin 10. mars kl. 19.30.
*Eldrafelagið Borgin*

**BARNABINGO**
verður leygardagin 19. mars kl. 16.00. Vinningar: Páskaregg.
*Eydnan*

**PÁSKABINGO**
verður sunnudagin 13. mars kl. 16.00. Høvuðsvinningur 1 gávukort á 1.000 kr. og 2 á 500 kr. Eykaspælið 1.000 kr. Drigið verður millum spølini.
*Eydnan*

## Bøkur

**NØKUR HEFTIR/BLØÐ**
av Illustreret Videnskab, árg. í 80-unum selist.
*Tlf. 313989*

**DISNEY BØKUR YNSKJAST**
Hevur nakar eina samling av disney bókum (Anders And Bogklub) at selja okkum bíliga.
*Tlf. 581216*

## Burturm. /funnið

**FRENSUR BURTURBLIVIN**
Strípultur grá/brúnur frensur er burturblivin. Seinast sæddur á Lítlutrøð. Vinarliga ringið
*tlf. 319216/519216*

**KETTLINGUR BURTURBLIVIN**
Reyð- og hvítstríputur kettlingur við hvítum labbum er blivin burtur við Íslandsvegin týsdagin 8. mars. Um nakar veit at siga okkum um kettlingin, vinarliga ring
*tlf. 316267 ella 260498*

**TANN SUM AV MISGÁUM**
hevur tikið ein svartan ullintan damufrakka vikuskifti 4.-5. mars í Tórshøll, verður vinarliga biðin um at heingja hann aftur, takk fyri.

**BURTURMIST Í RUNAVÍK**
Myrkabrúnur skinnhandski »harra«. Finnaraløn verður givin.
*Tlf. 448506*

**ERTIRLÝSING**
Lítil 3 lit ketta burturblivin norðuri í Sundum, Kollafjørður 6/3 05. Kettan er svørt, reyð og hvít, mest svørt. Hon hevur tumlar, bátt hálsband við endurskini og klokku. Um onkur veit ella hevur sæð hana vinarliga ringi
*tlf. 421473/243327*

**KETTA BURTURBLIVIN**
Grá ketta, við hvítum labbum og bringu, og lítil á vøkstri er burturblivin. Hon er seinast sædd uttanfyri Eysturskúlan. Um nakar veit at siga okkum umkettuna, vinarligast ringið á
*322242 ella 253766*

**EIN SVØRT DAMUTASKA SAKNAST**
Ein lítil svørt damutaska, bleiv burtur náttina til sunnudagin 6. mars. Seinast var hon í náttarbussinum, sum koyrdi suður til havnar frá PRIXnum í mentanarhúsinum. Um onkur hevur funnið hana, ella tikið hana av misgáum, vinarliga lat meg frætta á
*tlf. 254924, Noomi Dam*

## Býli í Føroyum

**NJÓT EITT VIKUSKIFTI VIÐ GJÓGV**
í góðum og vælhildnum sethúsum, ið hava 7 seingjarpláss og møguleika fyri eyka uppreiðing.
*Tlf. 424789 – best á kvøldi*

**ÍBÚÐ Í HAVN YNSKIST**
Ungt par ynskir íbúð í Havn skjótast møguligt. Vit hava fast arbeiði.
*Tlf. 222251*

**HÚS Á BYGD**
til leigu, køkur, stova, 3 kømur og baðiverilsi.
*Tlf. 508878*

**KJALLARAÍBÚÐ**
í Havn til leigu frá 1. apríl.
*Tlf. 314103/216103 og 267303*

**HÚS TIL LEIGU**
Nýggj hús, við tveimum kømurum, til leigu í Leynum frá evt. 1. apríl til ikki-roykjarar. Húsaleiga 4.500,- + ljós og hita. 2. mðr. dep.
*Tlf. 274467 millum kl. 21-22*

**ÍBÚÐ TIL LEIGU**
um páskirnar, miðskeiðis í Havnini, til leigu frá 20.3-2.4.
*Tlf. 210225*

**HÚS YNSKIST Í HAVN**
Familja upp á 5 søkir hús við 3 kømurun bíliga til leigu í Havn. Vit eru friðarlig og fara væl um, hvørki drekka ella roykja. Max 6.000 kr + ljós og varma.
*Vinarliga ringi 512080/456610*

**HÚS Í HAVN TIL SØLU**
við 2 íbúðum, um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 312116/512116*

**KAMAR/STOVA**
Í nýggjum húsum í Eysturbýnum við góðum útsýni og atgongd til tekøk og bað til leigu beinanvegin.
*Tlf. 270589*

**LÍTIL KJALLARAÍBÚÐ**
til leigu til friðarlig fólk fyri kr. 3.500,- pr. mðr. viðljós og varma.
*Tlf. 312116/512116*

**STÓRT KAMAR**
við atgongd til køk, baðiverilsi og vaskimaskinu, íroknað ljós og varma.
*Tlf. 312116/512116*

**HÚS Í SØLDARFIRÐI**
Hús til leigu í Søldarfirði frá 15. mars.
*Tlf. 257941*

**FRÍTÍÐ VIÐ GJÓGV**
Vælhildin gomul hús við Gjógv til leigu, styttri tíðarskeið, alt árið.
*Tlf. 423138, 214705 ella 271882*

**HJÁLPI MÆR!**
Íbúð ynskist, helst á Skálafjørðinum ella nærhendis Kambsdali. Prís max. 3.500 v/ hita og ljós. Eg fari væl um, royki og drekki ikki. Hava tit ella kenna tit onkran við íbúð.
*Ring 258407*

**HÚS TIL SØLU**
Hús í Sandavági til sølu. Boð undir 600.000 kr ongan áhuga. Skriva til Sosialin, box 76 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 2040/4*

**ÍBÚÐ TIL LEIGU**
90 fermetra loftsíbúð í vesturbýnum í Havn til leigu til friðalig ikki-roykjandi fólk. Er ikki vælegnað til smærri børn.
*E-mail: rent4me@sol.dk*

**UNGT FRIÐARLIGT PAR**
sum fer væl um, ynskir íbúð fyri sámuligan prís í Tórshavn ella aðrastaðni í Streymoynni. Vinarliga ring
*tlf. 256385/220097*

**TIL SØLU**
Sethús á Kambsdali til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 224396/445061*

## Býli uttanlands

**ÍBÚÐ YNSKIST**
í KBH. umráðnum. Eitt ungt par søkir íbúð til hálvan juni/juli. Fara væl um og gjalda til tíðina. Ring vinarliga
*370883 ella 223379*

## Dansur

**8 ÁRA GOMUL RYSSA**
av íslendskum slag til sølu.
*Tlf. 320335 eftir kl. 18*

## Dýr

**TIL SØLU**
Undulát-par til sølu fyri 400,- Hann grágrønur, hon himmalblá.
*Tórshavn, tlf. 253838*

**TIL SØLU**
Eitt undulátapar við búri og eitt eykab úr bíliga til sølu.
*Tlf. 421016/226689*

**FØROYSKUR HESTUR TIL SØLU**
Alt tilhoyr fylgir við fyri 8.000 kr.
*Tlf. 222527*

**KETTLINGAR**
4 sera fittir svart/hvítir og ein stríputur, tveir frensar og tvær kettur, eru 8 vikur. Kunnu fáast við at heinta tær.
*Tlf. 422389*

**HVALPE**
Særdeles søde og næsten ægte Border Collie hvalpe - gives væk og kan hentes i påsken, hvor de er 8 uger gamle. Er du interesseret i at få en hvalp, er du velkommen til at komme på besøg og se dem allerede nu - ring til dyrlæge Peter Østergård, mobil 556479 eller314272 og aftal nærmere.
*mobil 556479*

**TIL SØLU**
Dvørgahamstrari við búri til sølu.
*Tlf. 503531*

**FUGLABÚR TIL SØLU**
Stórt fuglabúr til sølu fyri bert 100 kr.
*Tlf. 582976/321702*

**2 HAMSTRARABÚR TIL SØLU**
fyri 200 kr. pr. stk. Eisini nógv tilhoyr, bíliga til sølu.
*Tlf. 582970/321702*

**MARSVÍNABÚR TIL SØLU**
Nú er tíð at seta marsvínini út. Vit hava eitt gott heimagjørt útibúr til sølu fyri bert 500 kr.
*Tlf. 321702/582976*

**TIL SØLU**
Dvørgahamstrari við búr og alt tilhoyr 300 kr.
*Tlf. 448935*

**ER TAÐ NAKAR DJÓRAVINUR**
Ið hevur eitt innhegna øki í Tórshavnar kommunu at lána okkum, so okkara tveir fittu hundar kunnu sleppa at renna leysir viðhvørt. Gjarna saman við øðrum hundi/hundum. Vinarliga ring
*Tlf. 214119 ella 256385*

**ER TAÐ NAKAR**
ið hevur 2 úti hon kaninir at selja okkum, so ringið
*tlf. 448535 ella 270635*

**FRENSUR BURTURBLIVIN**
Hann er burturblivin í miðbýnum í Havn. Hnan er gráur og hvítur og tað uttasta av halanum er boygt. Sær tú hann, vinarliga sig okkum frá á
*tlf. 311144/267735 ella 257228*

**CHIHUAHUA YNSKIST**
Chihuahua hvølpur ynskist.
*Tlf. 265343*

## Fartelefonir

**NOKIA 3300**
Ein sera vøkur Nokia 3300 við mp3-spælara til sølu fyri einans 1000 kr. Sum nýggj kostar hon 2.000 kr. Hon er eitt ára gomul.
*Tlf. 322193/218035*

**TIL SØLU**
Nokia 6100 fartelefon við litskermi, bíliga til sølu.
*Tlf. 251221*

## Fundir

**AÐALFUNDUR**
Eigarafelagið Jørundargøta/-Torkilsgøta hevur árliga aðalfundin hóskvøldið 17. mars klokkan 19.00 í Hoyvíkar Skúla.
*Nevndin*

**HAVNAR BJARGINGARFELAG**
Aðalfundur felagsins verður á Landsbókasavninum sunnudagin 20. mars 2005, kl. 16.00. Skrá sambært lógum felagsins. Húsamálið verður eisini fyri á fundinum.
*HBF*

**ÁRSAÐALFUNDUR**
Kongshavnar Kvinnufelag hevur ársaðalfund mikukvøldið 30. mars kl. 20. Skrá sambært lógum felagsins. Er fundurin ikki viðtøkuførur verður eykaaðalfundur hálvan tíma seinni.
*Nevndin*

**ALZHEIMARFELAGIÐ**
hevur aðalfund tann 2. apríl. Skrá samb. lógum felagsins. Mál til viðgerðar á fundinum skulu sambært viðtøkum felagsins verða nevndini í hendi í seinasta lagi 8 dagar fyri fundin. Tíð og stað verður lýst seinni. www.alzheimer.fo
*Nevndin*

**SUÐUROYAR SAMBANDSFELAG**
Aðalfundur verður á Gistingarhúsinum við Á í Øravík mikudagin 30. mars kl. 20. Skrá sambært viðtøkunum.
*Nevndin*

**HAGASTEVNA**
Lýst verður til hagastevnuna fyri Rygsvíkina í Bíggjar skúla tann 6. apríl kl. 20.
*Hagastýrið*

**KOLLAFJARÐAR**
Fornminnisfelag hevur ársaðalfund í skúlanum hósdagin 31. marfs kl. 19.00.
*Kollafjarðar Fornminnisfelag*

**HÓSVÍKINGAR**
Ársaðalfundur verður í Bygdarhúsinum í Hósvík mikukvøldið 16. mars kl. 19.30. Skrá sambært lógum felagsins. Um neyðugt verður eykaaðalfundur 1/2 tíma aftaná. Allir limir eiga at møta.
*Bygdarfelagið Varðin*

**ÁRSAÐALFUNDUR FELAGSINS**
verður 22. mars 2005 í húsum felagsins.
*Eldrafelagið Nón*

**ELLISAKFØR AÐALFUND**
Árligi aðalfundurin hja Føroya Ellisakførum verður í hølum felagsins leygardagin 19. mars kl 16. Skrá sambært lógum felagsins
*Nevndin*

## Húsarhaldstól

**TIL SØLU**
Ein Husqvarna 1100 seymimaskina til sølu.
*Tlf. 315936 ella 254708 eftir kl. 17*

**ELEKTRONISK**
uppvaskimaskina Asea Cylinda fæst við at avheinta hana. Krevur ábøtur.
*Tlf. 448502/580116*

**EL-KOMFÝRUR**
Til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 311340*

**KØLISKÁP BÍLIGA TIL SØLU**
Køliskáp við lítlum frystirúmi til sølu fyri 400 kr. Stødd: 108 x 52 x 50.
*Tlf. 315152/515152*

**TIL SØLU**
Gram frystiboks til sølu fyri 500 kr.
*tlf. 316375*

**WHIRLPOOL VASKIMASKINA**
4 ár við stórari trumlu, til sølu fyri 1800 kr.
*Tlf. 322239/582354*

## Innbúgv

**TIL SØLU**
2 ruggustólar við leðurhyndum á 400,- kr. 1 boksmadrassa 120x200 cm. kr. 500,- 1 skrivaraborð, fura, 200,- kr. 1 sofaborð, lítið, kr. 100,-
*Tlf. 447978*

**DUPULTSONG**
til sølu, kløðd við krom, 1.40 m br. 2. m. l.
*Tlf. 221589*

**LENISTÓLUR**
við beinleni, kann regulerast.
*Tlf. 221589*

**TIL SØLU**
Sofa + 2 stólar úr træið við hyndum 1.000,- sær út sum nýtt. Sjónvarpsborð úr træið 400,- sær eisini út sum nýtt. Boksmadrassa 90 x 200 fyri 400,-
*Tlf. 222137*

**KEYPMANSDISKUR**
úr træ, til sølu fyri 1.500 kr.
*Tlf. 322850*

**BOSTONSOFA FRÁ SKEMMUNI**
Vit mangla eina natúrhvíta/ráhvíta sofu, av merkinum Boston. Fingust í Skemmuni fyri nøkrum fáum árum síðani. Hevur tú eina slíka, vinarliga ring. Tað er ein 3-mans sofa og prísurin lá uml. 2.000 kr.
*Tlf. 310055 ella 250118*

**LÍTIÐ BRÚKT BOXSONG**
Í tveimum, 2 x 90x200. Toppmadrass, støðd 180x200. Bert tvey ára gomul. Nýprísur frá idehúsinum. Nú bert 2.000 kr.
*Tlf. 509090*

**BARNASONG**
Vælhildin barnasong støðd 145 x 75 cm til sølu fyri 500 kr.
*Tlf: 317376*

**HYGGIÐ HER!**
Koyggjusong (colorkids), við tilhoyrandi reol, skápi og skrivaraborði til sølu fyri 4000 kr.
*Tlf. 311867 aftaná kl. 17*

**HORNASOFA**
Brún horna leðursofa til sølu fyri 3000 kr. Sofan er í góðum standi. Ring 509999 um hettar hevur tykkara áhugað.
*Tlf. 509999*

**SKENKUR TIL SØLU**
Myrkur skenkur til sølu fyri kr. 2.000,- l. 90, b. 0,40 h. 1,80 m.
*Tlf. 311950*

**TEPPI**
Teppi fæst við at avheinta tað, støðd er 6 x 4 metur.
*Tlf. 311950*

**BÍLIGA TIL SØLU**
2 hvít klædnaskáp bíliga til sølu.
*Tlf. 319754*

**TIL SØLU**
Ein hvít brúkt song 140x200 i góðum brúktum Confort madrassum selist fyri 1.500 kr.
*Tlf. 447687*

**SPÍSISTOVUBORÐ**
+ 6 stólar til sølu fyri 400 kr.
*Tlf. 311340*

**TIL SØLU**
Myrkt hillasystem 3 sekt bíliga til sølu.
*Tlf. 332847-257647*

**TIL SØLU**
Køksborð + 4 stólar.
*Tlf. 269620*

**HORNASOFA TIL SØLU**
Vælhildin hornasofa ið kann nýtast sum sovisofa + sofaborð til sølu fyri 2.500,-
*Tlf. 448420*

**SKRIVARABORÐ**
Eitt nýtt skrivaraborð til sølu fyri 600 kr.
*Tlf. 311079/504969*

**CAFÉBORÐ TIL SØLU**
15 caféborð bíliga til sølu.
*Tlf. 213430*

## Lutaseðlar

**FØROYA FELAG MÓTI KRABBAMEINI**
Til árligu lutaseðlasøluna í nov. des. 2004 eru hesir vinnaranr. enn ikki avheintað. Nr. 140064 Nr. 93318 Nr. 167131 Nr. 33470. Vinningar, sum ikki eru avheintaðir fyri 1. apríl 2005 fella aftur til felagið.
*Føroya Felag móti Krabbameini*

## Matur

**NEYTAKJØT!**
Neytakjøt til sølu.
*Miðstovugarður á Sandi, tlf. 361057/213959*

**TIL SØLU**
Neytafjórðingur til sølu.
*Tlf. 328020/212920, Hestur*

## Pløgg

**PENAR KONFIRMATIÓNSSANDALIR**
nr. 40 til sølu fyri hálvan prís – 125,- kr. – bert brúktir eina ferð.
*Tlf. 271963*

**LJÓSIÐ – VENJINGARBÚNI**
Tann sum av misgáum hevur tikið mín spildurnýggja venjingarbúna (x-small) sum hekk í umklæðingarrúminum í Ítróttarhøllini á Nabb leygardagin tann 5/3-2005, verður vinarliga biðin um at ringja 316864 ella 216865.
*Barbara*

**BRÚÐARKLÆÐIR TIL DRONG**
Str. 6-8 ár, svartar buksir, hvít skjúrta, ljósir vestur og butterfly til sølu fyri kr. 1000
*Ring 269866/571243*

**BRÚNUR LEÐURJAKKI**
við Sony Ericsson 610 fartelefon í lummanum burturblivin 4. februar.
*Tlf. 216656*